Savnaðu 17 milliónir í tvær vikur

Fyribilsuppgerð vísir, at føroyingar teknaðu 17 milliónir krónur í Atlantic Petroleum

EIRIKUR LINDENSKOV

Tað eru eftir øllum at døma fleiri føroyingar enn teir, ið standa aftan fyri Atlantic Petroleum, sum trúgva upp á eitt føroyskt oljuævintýr.

Seinastu fjúrtan dagarnar hava umleið 1.000 føroyingar teknað ikki færri enn 17 milliónir krónur í partapeningi.

Av Atlantic Petroleum verður sagt, at tekningin varð framd í tøttum samstarvi við føroysku peningastovnarnar, og er hetta fyrstu ferð, at hesin háttur at útvega partapening er nýttur í Føroyum. Minstaupphæddin, ið skuldi teknast, var 15 milliónir krónur. Føroya Banki og Føroya Sparikassi veittu, saman við øðrum, trygd fyri, at henda upphædd varð rokkin.

Ein fyribilsuppgerð yvir tekningina frá peningastovnunum vísir, at teknaðar eru umleið 17 milliónir krónur.

Partapeningurin í Atlantic Petroleum er tí nú umleið 46 milliónir krónur.




Bíða eftir svari frá Interpol

HØGNI MOHR

Franski drápsmaðurin, ið sambært skotskum og fronskum tíðindafólki, skuldi vera ávegis til Føroya, er eftir øllum at døma ikki komin undir land enn. Leiðarin á kriminaldeildini í Havn, Bergleif Brimvík, hevur verið í sambandi við Interpol og spurt um mannin, ið skuldi havt dripið konu sína. Bergleif Brimvík sigur, at teir settu seg í samband við Interpol í gjár, og at teir fóru at handtaka mannin, um so var, at hann kom til Føroya.

Skotsku tíðindamenninir, sum Sosialurin tosaði við fyrradagin, søgdu, at eitt franskt løgreglulið var ávegis til Føroya, men hetta varð avsannað av løgreglustøðini í Havn. Berleif Brimvík sigur, at tað ber útlendskum løgregluliði at fremja handtøku í Føroyum, men so skulu myndugleikarnir her á staðnum hava givið loyvi til tess.

Vanlig mannagongd hevði verið, at løgreglan í Føroyum hevði handtikið slíkar brotsmenn, og síðani latið teir upp í hendurnar á løgreglu í øðrum landi; um so er, at brotsverkið er framt í egna landi brotmansins.



PET til fyrstu viðgerð

Tingfundur var seinnapartin fyrradagin. Til fyrstu viðgerðar var millum annað uppskot um ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "lov nr. 359 af 2. juni 1999 om undersøgelse af politiets efterretningsvirksomhed på det politiske område og af de aktiviteter, der var baggrund for denne virksomhed".

Tað var Høgni Hoydal, landsstýrismaður, ið 8. oktober legði uppskotið fyri tingið.

Sama uppskot var eisini til viðgerðar í tinginum í byrjanini av árinum, men varð tað ikki viðtikið undir triðju viðgerð.

Endurnýggjan av veiðiflotanum

18. oktober legði Katrin Dahl Jacobsen úr Javnaðarflokkinum fram uppskot um íløgugrunn til endurnýggjan av veiðiflotanum. Hetta uppskot var til fyrstu viðgerðar í tinginum fyrradagin.

Talan skal vera um ein grunn, ið kann seta upp til 40 prosent í partapeningi í nýggj skip. Ein treyt er tó, at grunnurin skal hava ávirkan á avgerðir í felagnum.

Tá íløgan er lívfør, skal grunnurin selja partabrøvini aftur, um tað ikki kann gerast við yvirskoti.

Landsfundur


Fólkaflokkurin hevur landsfund í Leirvík leygardagin 6. nov. kl. 9.30. Íslendski fíggjarmálaráðharrin, Geir Haarde, verður gestarøðari á fundinum.
Um kvøldi verður døguriði.

Fólkaflokkurin


Heimabio

STATOIL

Nýggir filmar hvørja viku



OLSENS BANDENS SIDSTE STIK



SIDSTE SPIL



THIN RED LINE



VILD MED MARY

Leiga videofilmar á hesum støðum:
Statoilstøðin í Gundadali tel. 314770
Statoilstøðin í Kollafirði tel. 421083
Statoilstøðin í Saltangará tel. 449133
Statoilstøðin í Klaksvík tel. 457353
Statoilstøðin í Sørvági tel. 332001
Statoilstøðin í Skálabotni tel. 441200
Statoilstøðin í Leirvík tel. 443360

STATOIL

støðirnar kring landið